# Kringvarpslógin fyri tingið í dag

**Størsta broytingin í nýggju kringvarpslógini verður, at tað framyvir verður eitt stýri, ið fær meginpartin av heimildunum, sum landsstýrismaðurin hevur nú.**

FJØLMIÐLAR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*


*Uppskotið um kringvarp kemur til 1. viðgerð í tinginum í dag*

Við nýggju skipanini um Kringvarp Føroya, verða ávísar broytingar í bygnaðinum í mun til áður. Tær báðar mest týðandi broytingarnar verða, í fyrsta lagi, at stovnurin skal hava eitt stýri við sjey limum, sum skal hava evstu ábyrgdina og virka sum skodd millum stovnin og politiska myndugleikan. Hin stóra broytingin verður, at public-service uppgávurnar hjá stovninum skulu raðfestast av landsstýrismanninum í samstarvi við leiðsluna og stýrið, eftir aðalorðaskifti í løgtinginum. Tá upskotið varð sent út til hoyringar, eitt nú hjá leiðsluni í kringvarpinum, kom til sjóndar, at kringvarpið ivast í, um hesar báðar broytingar eru batar fyri public-service uppgávurnar hjá stovnium. Tískil prenta vit her á síðuni eisini partar av hoyringssvarinum frá Jógvani Jespersen.

Av øðrum broytingum í nýggja uppskotinum um kringvarp kunnu nevnast, at eitt kringvarpsgjald verður fyri hvørt húski, at tað gerst lættari hjá privatum at seta á stovn kringvarp og at kringvarpið skal varðveita alt talgilt tilfar í einum miðlasavni.

Annað viðurskifti, sum privatu miðlarnir hava bíðað eftir í spenningi er spurningurin um, hvørt almennu fjølmiðlarnir framhaldandi fara at vera partvíst fíggjaðir við lýsingum, umframt vanliga lurtara- og hyggjaragjaldinum. Og sambært uppskotinum frá landsstýrismanninum í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, skulu almennu fjølmiðlarnir framhaldandi hava loyvi til at fíggja ein part av virkseminum við lýsingum. Tó hevur landsstýrismaðurin ásett í lógaruppskotinum, at kringvarpið skal ikki hava loyvi til at lýsa á heimasíðu stovnsins.

### Samanleggingin veruleiki

Sambært uppskotinum er endamálið við broytingunum í lógini um kringvarp at fáa ásett løgfrøðiligu karmarnar, nú stovnarnir Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya leggja saman í nýggja og samanlagda stovnin, Kringvarp Føroya.

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, verður greitt nærri frá um uppskotið, og verða tað nakrar av hesum viðmerkingum, sum vit fara at tríva í her.

### Tryggja public service

Í uppskotinum verður, sum nakað nýtt, mælt til at skipa Kringvarp Føroya við einum stýri, ið fær meginpartin av teimum heimildum, sum landsstýrismaðurin hevur nú. Í viðmerkingunum stendur, at royndir vísa, at tað er óheppið, mett frá einum public service sjónarmiði, at landsstýrismaðurin hevur beinleiðis ábyrgd av kringvarpi. Tí verður mett, at eitt stýri millum landsstýrismannin og stovnin er neyðugt, til tess at tryggja public service meginreglurnar og redaksjonella frælsið umframt.

Í uppskotinum skjýtur landsstýrismaðurin upp, at stýrið verður mannað við 7 limum, og at tað kemur at hava ovastu leiðsluna á stovninu. Stýrið skal hava eftirlitsuppgávuna í sambandi við ásetingarnar í lógini og avtalum annars. Og stjórin kemur at hava dagligu ábyrgdina og setir og loysir starvsfólk. Stjórin hevur programmábyrgdina, men skal í samstarvi við stýrið leggja yvirskipaða programmpolitikkin til rættis.

Landsstýrismaðurin tilnevnir sjey stýrislimir og sjey varalimir fyri 4 ár í senn og stýrislimir og varalimir hjá hesum verða tilnevndir soleiðis:

Átta persónar verða tilmæltir av politisku flokkunum, ið hava umboð í Løgtinginum. Millum hesar átta tilnevnir landsstýrismaðurin ávikavist fýra stýrislimir og fýra varalimir. Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá starvsfólkunum í føstum starvi í Kringvarpi Føroya. Landsstýrismaðurin tilnevnir eftir egnari avgerð tveir stýrislimir og tveir varalimir.

### Raðfest public-service

Eitt eyðkenni innan føroyska fjølmiðlaheimin hevur verið, at tað hevur verið ilt at raðfesta public-service uppgávurnar, tí orka og játtan hava ikki altíð svarað til megnar hugtakið public-service (red.). Í hesum sambandi skjýtur landsstýrismaðurin upp, at hann ger ein public-service sáttmála við Kringvarp Føroya. Ætlanin við hesum er, at landsstýrismaðurin, eftir eitt aðalorðaskifti í Løgtinginum um public-service, skal kunna avtala við leiðsluna í kringvarpinum um, at serstakir partar av public-service økinum verða raðfestir frammarlaga í einum ávísum tíðarskeiði, eitt nú í trý ár. Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið, er ætlanin við hesum ikki, at landsstýrismaður og Løgting skulu leggja seg út í programmábyrgdina hjá stjóranum, men at landsstýrismaðurin skal kunna raðfesta ávís mentanarøki. Talan kann eitt nú vera um føroyskt mál, sendingar fyri børn og ung o.s.fr.

### Aðrar broytingar

Í uppskotinum um løgtingslóg um kringvarp, sum kemur til viðgerð í tinginum í dag, verður eisini skotið upp, at útvarps- og sjónvarpsgjøldini verða løgd saman í eitt kringvarpsgjald.

Ásetingar eru um, at kringvarpið skal varðveita alt talgilt tilfar í einum miðlasavnið. Eisini er ætlanin, at analoga tilfarið skal talgildast og varðveitast fyri alla tíð í miðlasavninum. Somuleiðis verður latið upp fyri, at aðrir mentanarstovnar eins og privatar kringvarpsstøðir kunnu, um ynski er um hetta, varðveita teirra tilfar í miðlasavninum.

Í uppskotinum verður eisini sagt, at sum støðan er í dag, verður ikki mett neyðugt at varðveita Loftmiðlanevndina og programmnevndirnar. Sambært viðmerkingunum er tað einki, ið forðar fyri, at landsstýrismaðurin við sínari fyrisiting kann útinna tær uppgávur, sum nú liggja hjá Loftmiðlanevndini, og viðvíkjandi programmnevndirnar fer stýrið framyvir at røkja hesar uppgávur, verður sagt.

Annað sum nevnt verður í uppskotinum er, at eitt hvørt felag, sum kringvarpar til fleiri privatar bústaðir, skal hava sendiloyvi. Orsøkin til hesa broyting er, at tørvur er á eftirliti við teimum sendingum, sum eitt nú eigarafeløg senda. Fleiri av hesum eigarafeløgum eru so mikið stór, at sent verður til heilar býlingar.

## Er skoddið nóg tætt?


*Jógvan Jespersen, stjóri í Kringvarpi Føroya*

Kringvarp Føroya vísir á ymisk viðurskifti í sambandi við ta skipan, sum sett er í lógina. Eitt nú metir Jógvan Jespersen, stjóri, at tað ber illa til at meta um ella staðfesta, um tær reglur, sum landsstýrismaðurin skal áseta við heimild í lógini, fara at veita ta trygd í mun til public-service, sum lagt er upp til.

Jógvan Jespersen sigur í hoyringsskrivinum, at tá tað snýr seg um programmvirksemi, metir hann ikki, at lógaruppskotið í sær sjálvum veitir trygd fyri, at stovnurin fer at virka óheftur av politisku skipanini.

– Landsstýrismaðurin fær heimild til at áseta nærri reglur á nógvum økjum, og ikki fyrr enn hesar ásetingar eru kendar, ber til at staðfesta, um skipanin fer at veita trygd fyri, at skiftandi politisk stýri ikki hava møguleika fyri at gera sína ávirkan á programmvirksemið galdandi, sigur hann og heldur fram, við at siga, at tey fegnast um, at tað við ásetingini um eitt stýri verður sett eitt skott ímillum landsstýrismannin og stovnsleiðsluna, og vónandi fer skipanin at beina burtur allan iva um, at politiska valdið kann ávirka programmvirksemið.

Í grein 4, 4. stk. er ásett, at formaðurin og næstformaðurin í stýrinum ”skulu samlað umboða førleikar, ið fevna um dyggan kunnleika til og innlit í føroysk samfelagsviðurskifti og mentan, fjølmiðlar og fíggjar- og roknskaparviðurskifti.”

Í viðmerkingunum verður sagt, at dyggur kunnleiki merkir í hesum høpi, at viðkomandi skulu hava útbúgving og/ella drúgvar starvsroyndir innan hesi øki.

Og Jógvan Jespersen sigur, at í grein 4, stk. 6 fær landsstýrismaðurin heimild til at áseta nærri reglur um, hvussu valið av stýrislimum, ið politisku flokkarnir skulu tilmæla, skal fara fram.

– Ikki fyrr enn hesar reglur eru kendar, ber til at staðfesta, um skipanin veitir trygd fyri, at talan er um eina fakliga rakstrarnevnd, sigur hann millum annað.

### Public Service sáttmáli

Jógvan Jespersen greiðir frá, at í grein 11 fær landsstýrismaðurin heimild til at gera ein Public Service sáttmála við kringvarpið. Tílíkur sáttmáli skal gerast, eftir at løgtingið hevur havt høvi til at umrøða innihaldið í sáttmálanum.

– Ein tílík skipan kann tykjast skilagóð, men hon kann lættliga føra til, at politiska skipanin beinleiðis fer at ávirka, hvussu programmvirksemið hjá kringvarpinum skal skipast, sigur hann og greiðir víðari frá, at vit í dag hava eitt reint føroyskt útvarp og eitt sjónvarp, sum eftir førimuni roynir at framleiða so nógva føroyskar sendingar, sum gjørligt.

– Vit kundu hugsað okkum eitt enn betri programmtilboð við fleiri dygdargóðum sendingum bæði í útvarpi og sjónvarpi. Men tað er ikki tí, at hugskotini tróta, men fíggjarliga orkan er avmarkað, og vit royna sum frægast at fáa sum mest burtur úr tí tilfeingi, vit ráða yvir. Vit noyðast støðugt at raðfesta, so vit út frá eini heildarmeting fáa tað frægasta programmtilboðið burtur úr tøku orkuni, sigur Jógvan Jespersen í hoyringssvarinum. Og hann heldur fram, at fer politiska valdið í einum public-service sáttmála at áseta, at ávísar sendingar skulu raðfestast hægri í útvarpi ella sjónvarpi, ber hetta samstundis í sær, at aðrar sendingar skulu takast av skránni, og í tí støðuni hevur politiska valdið beinleiðis programmpolitiska medávirkan.

– Viðurskiftini hjá okkum kunnu ikki samanberast við støðuna hjá eitt nú teimum stóru norðurlendsku ríkisútvarpunum, tí teirra fíggjarliga orka er av slíkari støðd, at ein public-service sáttmáli ikki ávirkar á sama hátt, sum hjá okkum, sigur hann og vísir á, at politiska valdið fyrr hevur roynt at lóggivið fyri programmvirkseminum. Í grein 17, stk. 2 í galdandi kringvarpslóg frá 1998 er ásett, at málið er, at 1. januar 2001 skuldi ein triðingur av senditíðini hjá sjónvarpinum verða føroysk framleiðsla.

– Tveir møguleikar eru fyri at røkka hesum máli. Annar er at játta pening til at økja føroysku framleiðsluna, og hin er at minka um útlendska partin av senditíðini. Tann fyrri møguleikin hevur ikki víst seg at vera realistiskur, og tann seinni gevur neyvan nakra meining, sigur kringvarpsstjórin í hoyringsskrivinum.